Álit

í

løgtingsmáli nr. 14/2020: Uppskot til løgtingslóg um broyting í lovbekendtgørelse om straffeloven (Revsilógin) (Nágreinan av § 119, stk. 1)

Bjarni Hammer, løgtingsmaður, hevur vegna Javnaðarflokkin lagt málið fram tann 1. september 2020, og eftir 1. viðgerð tann 9. september 2020 er tað beint Rættarnevndini.

Nevndin hevur viðgjørt málið á fundum tann 16. og 23. september 2020.

Undir viðgerðini hevur nevndin havt fund við Bárð á Steig Nielsen, løgmann.

Nevndin heldur tað vera umráðandi, at § 119, stk. 1 í Revsilógini skjótast gjørligt verður broytt til tess at fáa til vegar greiða heimild at revsa harðskap móti persónum, sum virka í tænastu ella starvi fyri hitt almenna.

Løgmaður hevur á fundi við nevndina upplýst, at uppskotið, sum m.a. er viðgjørt saman við málkønum, verður mett at fevna um tær gerðir, sum Føroya Rættur og Eystari Landsrættur hava frídømt persónar fyri, tí revsirættarliga heimildin ikki verður hildin at vera púra greið.

Við hesum viðmerkingum tekur ein samd nevnd tekur undir við málinum og mælir Løgtinginum til at samtykkja uppskotið.

Rættarnevndin, 24. september 2020

Christian Andreasen formaður	Ingilín Didriksen Strøm næstformaður	Frimodt Rasmussen
Erhard Joensen	Steffan Klein Poulsen	Sirið Stenberg
	Hervør Pálsdóttir	